# Spyrja um alt møguligt

**Heita telefonlinjan hjá Føroya Arbeiðarafelag hevur fingið góða undirtøku**

LIMATÆNASTA
*Áki Bertholdsen*



*Seinnapartin hvønn hósdag situr Páll Nielsen, sakførari hjá Føroya Arbeiðarafelag við heitu linjuna og svarar spurningum. Nú er hann farin í summarfrí, men hann byrjar aftur umleið 1. september*

Tað hevur verið stórur tørvur á hesum. So tað er lítil ivi um, at tað fer at halda fram.

Nú heita telefonlinjan hjá Føroya Arbeiðarafelag fer í summarfrí kann ikki sigast annað, enn at hon hevur fingið seragóða undirtøku. Tað var í vár, at Føroya Arbeiðarafelag fór undir eina nýggja tænastu fyri limirnar, har teir kundu ringja á felagið ávísar tíðir við ymsum spurningum.

– Vit hava havt sakførara felagsins sitandi á skrivstovuni hvønn hósdag frá klokkan 16-18 og hesa tíðina hevur so borið til hjá limum okkara at ringt inn við spurningum til hansara, sigur IngeborgVinhter.

– Tað verður alsamt meiri og meiri umsitingarligt at hava við fakfelagsviðurskifti at gera og tað vant meiri og meiri upp á seg, at fólk ringdi á skrivstovuna at spyrja um alskyns faklig viðurskifti, tað kundi vera um sáttmálaviðurskifti, um dagpeningaskipanina, um tryggingarspurningar, frítíðarlógina, vanlukkutryggingina, barnsburðarfarloyvi o.s.fr., o.s.fr., sigur hon.

– Í tann mun tað bar til, svaraðu vit upp á standandi fót. Men í heilt nógvum førum var tað neyðugt hjá okkum at venda spurningunum til sakførara okkara.

– Tí kom hugskotið um at skipa eina tænastu, har sakførarin var at hitta fastar tíðir, tá ið hann skuldi vera til taks hjá limunum.

### Tveir tímar

Vit gjørdu tí av at royna hetta tveir tímar um vikuna, hvønn hósdag frá kl. 16-18. Tíðin er ásett fyri at fólk eisini kundu ringja eftir vanliga arbeiðstíð.

– Vit hava nú roynt hesa skipanina í góðar fýra mánaðir og hendan tíðin hevur víst, tað tað avgjørt var stórur tørvur á hesi tænastu, sigur Ingeborg Vinther.

Hon sigur, at tað hava heilt nógv brúkt hesa tænastuna og talan er bæði um lokalfeløg og vanligr limir sum ringja.

So vítt tað ber til, verður svarað upp á standandi fót. Men viðhvørt er neyðugt at kanna spurningar nærri, men so fáa tey svar aftur.

Hon sigur, at tað hevur stóran fyrimun fyri limirnar, at tey aloftast kunnu fáa svar upp á standandi fót, men tað hevur eisini stóran týdfning fyri felagið at hava fastar tíðir.

– Sjálvsagt kunnu mál stinga seg upp sum gera, at fólk ringja uttanfyri hesar tíðirnar, og tað eru tey sjálvandi eisini vælkomin til, men av tí at fastar tíðir eru, eru tey mong sum brúka tað høvi, tí tá vita tey, at tey fáa tal á sakførara okkara.

IngeborgVinther sigur, at spurningarnir eru um alt møguligt, um sáttmálar um sáttmálatulkingar, um yvirtíð, um frítíð o.s. fr.

Nú er tænastan farin í summarfrí,men hon verður tikin uppaftur um mánaðarskiftið august/september.

# Fakfeløg klaga: Løgreglan fór langt útum sínar heimildir

**Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðsmannafelag hava klagað løgregluna fyri ríkisadvokatinum í sambandi við verkfallið í fjør**

KLAGA
*Áki Bertholdsen*

Føroya Arbeiðarafelag og HavnarArbeiðsmannafelag hava ongantíð dult fyri, at tey vóru sera misnøgd við framferðina hjá løgregluni í sambandi við verkfallið í fjør.

Í sambandi við verkfallið vórðu vegurin í Kollafirði og fleiri aðrastaðni í landinum, blokeraðir og tað endaði við, at Løgreglan legði uppí.

Men fakfeløgini góðtaka ikki framferðina hjá løgregluni og tey klagaðu tí til Fútan um framferðina hjá henni.

Men Fútin hevur víst málið frá sær og hann hevur boðað frá, at hann ger ikki meiri við tað.

Men hesum vilja fakfeløgini ikki lata sær lynda og avgerðin hjá fútanum hevur ikki fingið tey at sleppa málinum og tey góðtaka framvegis ikki framferðina hjá løgregluni Tvørturímóti hava tey síðani gjørt av at klaga løgregluna fyri ríkisadvokatinum, sum er hægsti myndugleiki á økinum.

– Vit halda, at løgreglan fór langt útum sínar heimildir og at hon gjørdi nógv meiri av enn neyðugt var, fyri at gera sítt arbeiði, sigur Ingeborg Vinther, formaður í Føroya Arbeiðarafelg í eini viðmerking til klaguna.

### Lurtaðu eftir telefonini í loyndum?

Í klaguni nevna fakfeløgini fleiri ítøkilig dømi um framferð hjá løgregluni, sum tey ikki vilja góðtaka.

– Eitt nú møtti løgreglan upp og søgdu, at teir komu við einum fútabanni ímóti blokadunum.

– Men eitt fútabann hevur onki við løgregluna at gera, og tað er als ikki løgreglan, sum hevur heimild at seta fútabann í verk. Eitt fútabann er ein avgerð, sum einans kann takast av dómsvaldinum, sigur Ingeborg Vinther.



*Lurtaði løgreglan eftir telefonunum hjá Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðsmannafelag í loyndum, tá ið verkfallið var í fjør, spyrja fakfeløgini. Nú hava tey klagað løgregluna fyri ríkisadvokatunum*

Hon fýlist eisini á, at løgreglan einans vildi geva fekfeløgunum 15 minuttir at taka blokadurnar kring landið av.

– Hetta er alt ov stutt skotbrá, tí Løgreglan veit, at vit hava ongan møguleika at taka allar blokadurnar kring landið av við so stuttari freist, sigur Ingeborg Vinther.

– Men so hava vit eisini lagt merki til, at løgreglan í sínum viðmerkingum til málið hevur sagt, at eitt korter var ríkiligt, tí tað var nógv telefonsamband ímillum skrivstovurnar í Havnini og blokaduvaktirnar.

Ingeborg Vinther spyr, hvussu løgreglan kann vita tað.

– Vit hava spurt okkum sjálvi, um løgreglan í loyndum hevur lurtað eftir telefonini hjá okkum, tí hvussu kann hon annars vita, hvussu telefonsamskiftið er ímillum skrivstovurnar hjá okkum og blokaduvaktirnar, spyr Ingeborg Vinther.

Hon sigur, at tey føldu seg eisini rættiliga forfylgd av løgregluni hesa tíðina, verkfallið vardi.

– Tað kom ofta fyri, at løgreglufólk tarnaðu okkum í vanligari ferðslu. Tað gjørdu teir ofta við at koyra aftaná okkum og forfylgja okkum, ikki bara í blokaduøkjum, men eisini í vanligari ferðslu. Ingeborg Vinther sigur, at bæði hon sjálv og aðrir nevndarlimir í fakfeløgunum vóru fleiri ferðir úti fyri tí, at løgreglan forfylgdi teimum runt í Havnini í bili.

– Alt hetta ger,a t vit føla okkum at hava verið fyri rættiliga grovum ágangi frá løgregluni og tað finan vit okkum ikki í. Tí hava vit kært framferðina hjá løgregluni fyri ríkisadvokatinum, sigur Ingeborg Vinther.

Tað eydnaðist ikki at fáa eina viðmerking frá fútanum, áðrenn blaðið fór til prentingar



# Norrøna á Klaksvík



*Norrøna fór av Havnini til Íslands mikukvøldið klokkan sjey.*
*Men eitt av ferðafólkunum tørvaði sjúkrahjálp, so hon legði leiðina inn á Klaksvík, har ferðafólkið bleiv sett í land um áttatíðina. Sjúkrabilur stóð á Kósakeiini og flutti ferðafólkið til Klaksvíkar Sjúkrahús. Ikki er greitt, hvat bagdi ferðafólkinum. Síðani helt Norrøna leiðina fram til Íslands.*

*Mynd: Blitz Foto*

# Arbeiða nógvan gullaks í Miðvági

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Í Miðvági arbeiða tey ikki bara upsa, men eisini gulllaks, sum verður virkaður til fars.

Síðan viku 26 hevur virkið keypt gullaks frá trolaranum, Vesturbúgvanum. Gullaksurin verður arbeiddur í øðrum rúmi enn upsin, og her arbeiða eini 20 fólk í tveimum vaktum; tann fyrra frá kl. 8-16 og tann seinna frá kl. 16 til midnátt.

Hesa vikuna hevur rættiliga nógv fiskaarbeiði verið á Fiskavirking í Vestmanna. Tey, sum arbeiða upsa, hava arbeitt til kl. 19 og longri út á kvøldið.

Vesturbúgvin hevur landað gullaks í Miðvági í vikuni, og Vestmenningur hevur verið við upsa.

Hvussu nógv Vestmenningur hevði inni, vistu tey ikki at siga okkum, tá ið vit frættu hósdagin, men Vesturbúgvin hevði fulla last. Frá mánadegnum fer fólkið á virkinum í summarfrí og tikið verður ikki ímóti fiski tær næstu tríggjar vikurnar.




Í dag 13/7 brestir ársins brúktbilabumba við sera góðum avslátri



Prísirnir eru áðrenn avsláttur

| | | |
|---|---|---|
| Citroen Saxo 1,5D 3h<br>km. 50.000, árg. juli 1998<br>85.000,- | Citroen Xsara 1,9TD 5H<br>km. 117.000, árg. juni. 1999<br>137.000,- | Citroen Xantia 2,0 HDi<br>km. 43.000, árg. juni 1999<br>160.000,- |
| Mazda Demio 1,3 3h<br>km. 50.000, árg. feb 1999<br>87.000,- | Citroen Xsara 1,6i stc.<br>km. 36.000, árg. apr. 1999<br>133.000,- | Mitsubishi Pajero 2,8TDi GLS 5h<br>km. 82.000, árg. sept. 1997<br>177.000,- |
| Citroen Berlingo 1,9D<br>km. 81.000, árg. sept. 1998<br>107.000,- | Citroen Xantia 1,9TD<br>km. 60.000, árg. feb. 1998<br>118.000,- | Mitsubishi L300 2,5D<br>km. 161.000, árg. juni 1994<br>70.000,- |
| Toyota Carina 2,0<br>km. 173.000, árg. jan. 1992<br>52.000,- | Citroen Xantia 1,8i 16V<br>km. 63.000, árg. okt. 1996<br>112.000,- | Mitsubishi Carisma 1,6Gl 5h<br>km. 64.000, árg. mars 1997<br>105.000,- |
| Citroen Xsara 2,0 HDi 5H<br>km. 90.000, árg. nov. 1999<br>145.000,- | Citroen Xantia 1,9TD stc SX<br>km. 45.000, árg. mars 1999<br>160.000,- | Seat Cordoba 1,9SDi stc. 5h<br>km. 35.500, árg. aug. 1999<br>115.000,- |

Møguleiki er eisini fyri at royna nýggjar bilar

Vit hava fleiri aðrar bilar á goymslu

Vælkomin til

CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI

Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo